## Kanna vitan um fisk

Í januar vóru granskarar hjá grønlendska náttúrustovninum í Upernavik og bygdunum har um vegir og savnaðu vitan um tey ymsu fislasløgini, sum fiskimenn har á leiðini royna eftir. Vitjanin har er partur av einari størri verkætlan, sum hevur til endamáls at savna vitan um, hvørji fiskasløg eru hvar, og hvussu tey verða troytt í dag. Tilsvarandi kanningar eru gjørdar aðrastaðni í Grønlandi fyrr. Arbeiðið á Upernavik-leiðini hevur samband við, at oljufelagið Cairn hevur fingið loyvi at royndarbora eftir olju í økinum Disko Vestur í summar, sigur kringvarpið KNR.



## Tingaðust um ES

Íslendski uttanríkisráðharrin, Össur Skarphéðinsson, var í gjár í Berlin og tosaði við týska starvsbróður sín, Guido Westerwelle. Eitt høvuðsevni á fundinum var íslendska umsóknin um limaskap í ES, og hvønn stuðul hon kann fáa frá týskum politikarum. Týski uttanríkisráðharrin segði, at týska stjórnin er fegin um umsóknina úr Íslandi, og at ES-nevndin hevur mælt til, at veruligar samráðingar verða tiknar upp um limaskap. Umframt ES-umsóknina umrøddu teir báðir ráðharrarnir handilssamskiftið millum Týskland og Ísland.

# Okkara fortíð út á netið

**Nú ber til hjá øllum at leita í gomlu kirkjubókunum og øðrum skjølum, ið goyma ein hóp av søgum um okkara forfedrar og teirra livikor**

SØGA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Rolf Guttesen, geografir og limur í ráðgevingarbólkinum, hevur arbeitt í fleiri ár við parti av tilfarinum sum nú liggur á www.history.fo*

Einar 15.000 síður av gomlum skjølum kirkjubókum, fólkateljingum og frágreiðingum um livikor eru nú lagdar út á nýggju heimasíðuna www.history.fo, har øll í hava áhuga fyri okkara fortíð ókeypis kunnu leita fram upplýsingar og taka skjøl niður.

Heimasíðan gevur ikki bara neyvt hagfrøðiligt yvirlit yvir føroyingar heilt aftur til 1719. Handan tølini goyma seg eisini hópin av upplýsingum um, hvussu føroyingar livdu og arbeiddu í gomlum døgum, hvussu tey vóru fyri fíggjarliga og sosialt og í onkrum førum hvussu væl ella illa tey skikkaðu sær.

### Kirkjubók frá 1719

Heimasíðan www.history.fo er skipað soleiðis, at skjølini eru býtt upp í bólkar antin í mun til evni ella í mun til hvør myndugleiki ið hevur framleitt tey. Hetta er gjørt so, at tað verður lættari hjá brúkaranum at finna skjølini.

Størsti keldubólkurin higartil eru kirkjubøkur, sum innihalda upplýsingar um føðing/dóp, ferming, vígslu og deyð, hjá øllum føroyingum. Elsta kirkjubókin sum í løtuni er á heimasíðuni byrjar í 1719 og er fyri Sandoy. Yngsta kirkjubókin endar í 1910 og er fyri Suðurstreymoy. Aðrir keldubólkar eru sokallaðar 'frágreiðingar' (Indberetninger), sum embætisfólk hava sent miðfyrisitingini.

Á tíðinfundi í morgun greiddi Rolf Guttesen, geografur, nærri frá onkrum av hesum frágreiðingum, sum snúgva seg um livikorini hjá fólki í gomlum døgum. Har ber til dømis til at síggja, hvussu nógva ull, bátspartar, neyt, korn og annað ymsu húsarhaldini áttu. Av hesum frágreiðingum sæst týðiligt at einkjur og einligir menn ofta vóru sera illa fyri, og vit kunnu undrast yvir, hvat tey yvirhøvur livdu av.

Í onkrum av frágreiðingunum hevur embætisfólki havt til uppgávu at kanna 'lóg og landaskil' í bygdini. Har eru mangar upplýsingar um drekkarí og annað sum eisini gevur eina enn meir nuanseraða mynd av sosialu støðuni hjá fólki tá á døgum, greiddi Rolf Guttesen frá.

### Kunnu rokna sjálvi

Ætlanin er eisini, at aðrir størir keldubólkar verða lagdir út á heimasíðuna. Ein teirra er sokallaðu 'fólkateljingarnar' harav tann elsta er frá 1801, meðan tann í løtuni yngsta alment atgongda er frá 1925. Hesar fólkateljingar verða væntandi tøkar á heimasíðuni komandi mánaðarnar.

Flestu keldurnar eru lagdar út í upprunaformi, sum skanningar, meðan aðrar eru avskrivaðar. Løbner'sa Tabellir eru t.d. lagdar út í excelformati, so øll kunna kopiera og beinleiðis rokna uppá tey mongu tølini, sum hendan keldan hevur. Ymisk fólk hava arbeitt við keldunum ella avskrivað tær. Í flestum førum eru tað limir í ráðgevingarbólkinum, ið hava gjørt hetta arbeiði, men eisini onnur fólk hava tikið lut.

### Landsskjalasavnið og ráðgevingarbólkur

Tað er Landsskjalasavnið, sum eigur og umsitur heimasíðuna www.history.fo. Ein ráðgevingarbólkur við 6 fakfólkum, er knýttur at menningini av heimasíðuni. Í hesum ráðgevingarbólki sita, fyri Landsskjalasavnið: Lena Nolsøe, savnsvørður/søgufrøðingur, Gudny D. Rasmussen, KT-vørður og Sámal T.F. Johansen, landsskjalavørður/søgufrøðingur. Aðrir limir í bólkinum eru: Rolf Guttesen, geografur, Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur og Arne Thorteinsson, fornfrøðingur.

Landsskjalasavnið og ráðgevingarbólkurin hava arbeitt við hugskotinum til heimasíðuna í eini 2-3 ár og hava brúkt hetta seinasta árið ella so til at skannað tilfar og at geva síðuni endaligt snið.

Sum nevt kunnu øll brúka tilfarið á heimasíðuni ókeypis. Einasta krav til brúkarar er, at tey vísa til kelduna.



*Øll kunnu nú leita fram upplýsingar og søgur um okkara fortíð á heimasíðini www.history.fo*





SKEIÐ 27. & 28. MAI 2010

**The very best of Excel, Word, PowerPoint & Outlook**

- Brúkar tú Word, Outlook, Excel og Power Point í tínum dagliga arbeiði?
- Gjørt tú tingini uppá tann ósmarta mátan við fult av umvegum?
- Kundi tú hugsað tær at fingið ein lættari dagligdag við hjálp av forritunum?
- So er stundin komin at arbeiða eitt sindur smartari og gagnnýta tey amboð, tú longu kortini hevur.
- Við at arbeiða smartari, vinnur tú nógva tíð.
- Skeiðleiðari er Michael Bosholdt, ið fleiri ferðir er kosin ársins IT-undirvísari hjá skeiðsfyritøkuni Confex, sum Synergi samstarvar við.

Tilmelding og les meira um skeiði á www.synergi.fo ella ring 322 355

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - Tel. 32BELL (322 355)